# Scania og Claire skulu nú sigla til Suðuroyar

**Ætlanin er at rigga Scaniu til so at hon kann taka eitt sindur av farmi. Samstundis ætlar Strandferðslan at leiga Claire at sigla við farmi**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*


*Dúgvan er óinýtilig til suðuroyarsiglingina og tað vita øll frammanundfan, sigur javnaðarflokkurin, sum nú heitir á Løgmann um at taka sær av málinum. Her liggur Dúgvan við bryggju á norðaru kei á Tvøroyri hóskvøldið, men hetta gekk bara tí líkindini vóru góð*
*( Mynd: Leivur Nygaard)*

Nú tykist sum ferðasambandið ímillum Suðuroynna og Havnina fer at batna.

Síðani Smyril fór í dokk, hava mótmæli og atfinningarnar heglað niðuryvir Strandferðsluna og politisku myndugleikarnar og tí tykist sum um at ein bati er á veg.

Strandferðslan er nú í ferð við at leggja síðstu hond á eina avtalu um at leiga Claire frá Smyril Line til at sigla við farmi, teir dagar í vikuni, hon ananrs ikki er í sigling, tvs. frá mánadegi til hóskvøld. Og tað er alt, sum bendir á, at hendan avtalan verður í pottinum hvørja løtu.

Eftir, hvat skiltist á Strandferðsluni, var hesin møguleikin eisini umhugsaður fyrr í vikuni, men Claire var í Hetlandi ein eykatúr, so har gjørdust onki.

Samstundis er ætlanin at rigga Scaniu til, so at hon eisini kann taka eitt sindur av farmi.

Scania royndi ein túr ímillum Havnina og Suðuroynna mikudagin, men hon rullaði so illa, at tað er ikki ráðiligt at taka farm við henni. Hon hevur ongi festi í dekkinum, sum lastbilar og annar farmur kann surrast í og tí er vandi fyri, at farmurin fer at rósa og so kann skaði standast av.

Heini á Borg, farmaflunningsleiðari á Strandferðsluni, sigur, at tað hevur alstóran týdning at fáa farm til Suðuroyar eisini í vikuskiftunum og tí hevur Strandferðslan kannað, um tað ikki ber til at rigga Scaniu til við festum av onkrum slagi, so at hon kann taka eitt sindur av farmi. Og hann sigur í morgun, at líkt er til, at tað letur seg gera.

Annars er Dúgvan hildin uppat at sigla til Suðuroyar nú. Ìstaðin tekur Claire yvir og siglur fyrsta túrin av Havnini og suður á miðdegi- men í hvussu so er hesuferð, verður ongin farmur tikin við.

# Løgmaður eigur at geva suðuroyingum eina frágreiðing

**Javnaðarflokkurin heitir tí á løgmann um at geva suðuroyingum og øllum øðrum eina almenna frágreiðing um gongdina í málinum**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*


*Tvøroyrar Kommuna hevur lagt hart trýst á landsins myndugleikar við at nokta dúgvuni atløgupláss á Drelnesi Hóskvøldið varð gjørt álvari av og her er Rasmus Effersøe við at leggja at á Drelnesi so at Dúgvan ikki fær ligið har*
*( Mynd: Leivur Nygaard)*

– Politiskur og umsitingarligur ódugnaskapur.

Soleiðis kallar Føroya javnaðarflokkurin støðuna, sum valdar í suðuroyarsiglingini í løtuni.

Flokkurin hevur nú sent Anfinni Kallsberg, Løgmanni skriv, har heitt verður á hann um at taka sær av málinum.

Flokkurin sigur, at hann skilir til fulnar ta misnøgd, sum hevur tikið seg upp millum suðuroyingar, nú suðuroyarsiglingin aftur gjørdist offur fyri vánaliga planlegging frá landsins myndugleikum.

– Flokkurin minnir á, at tað ólag, sum verið hevur hvørt einasta ár á suðuroyarleiðini, tá Smyril skal á sleipistøð, stavar frá tí politisku skarnsgerð, ið gjørd varð, tá Teistin varð seldur av landinum.

Flokkurin sigur, at hinvegin skerst ikki burtur, at tað neyvan kann koma ávart á landsins leiðslu, at Smyril skal á sleipistøð hvørt einasta ár. Tískil gongur tað ikki við eini fram eftir fummum loysn, hvørt ár.

– Hetta er prógv um politiskan og umsitingarligan ódugnaskap, sum als ikki kann góðtakast sigur javnaðarflokkurin.

Hann vísir eisini á, at undir verkfallinum lá Smyril bundin við bryggja ú Havn, soleiðis at hann heldur ikki kundi tæna sum tilkalliskip, skuldi neyðugt verið við sjúkraflutningi, og flúgvilíkindi ikki vóru. – Hin vegin var verkfallið so mikið drúgvt, at alt dokkingararbeiðið lættliga kundi verið fingið frá hondini, um myndugleikarnir í staðin løgdu Smyril inn á Skála.

### Eina almenna frágreiðing

Somuleiðis heldur javnaðarflokkurin, at støðan hjá avloysaraskipinum Scaniu kann heldur ikki koma ávart á myndugeikarnar.

– Borð og stólar eru leys og til stóran ampa fyri ferðafólk. Harumframt kann skipið als ikki taka tyngri farm, tí einki kann surrast á dekkinum.

– Hóast vitandi um alt hetta, var einki gjørt fyri at bøta um hesi viðurskifti, hóast skipið hevur ligið við bryggju í Klaksvík í fleiri vikur. Men í staðin verður skipið í ein túr fyri síðan at seta annað skip inn, sum øll frammanundan vita er ónýtiligt til farleiðina, sigur javnaðarflokkurin

– Javnaðarflokkurin heitir tí á løgmann um at geva suðuroyingum og øllum øðrum eina almenna frágreiðing um gongdina í málinum.

– Endaliga verður heitt á løgmann um at taka neyðugu stigini til tess, at hetta óskil ikki fær loyvi at endurtaka seg, sigur Føroya javnaðarflokkur í skrivi til Anfinn, Kallsberg, løgmann.

# Garvaðir rokkarar spæla til dans í Hvalba

**Leygarkvøldið fer bólkurin Slick at spæla til dans í Roynhøllini í Hvalba. Slick er júst afturkomin av sera væleydnaðari ferð í Íslandi**

DANSUR
*Áki Bertholdsen*

Um vikuskiftið fáa suðuroyingar sum dáma rokktónleik forvitnslisliga vitjan. Leygarkvøldið fer tónleikabólkurin, Slick, at spæla til dans í Roynhøllini í Hvalba.

Slick er ein nýggjur bólkur, men tað skal ongin lata seg lumpa av, tí í talan er nevniliga um ógvuliga royndar tónleikarar við nógvum árum á baki á føroyska rokkpallinum:

Bæði Jens Tummas Næs, sum spælir bass og syngur og Hans Ravnsfjall, ið spælir Gittar og syngur, eru kendir úr bólkinum All That Rain. Høgni Zachariassen, er eisini kendur sum ein frálikur gittarspælari úr gamla bólkinum Ikaroz, men hesa seinastu tínina hevur hann ikki gjørt naka ðserligt við tónleikin, men handalagið hevur hann ikki mist. Og aftanfyri trummurnar situr ein sannur veteranur, Torkil Johannesen, sum hevur spælt í fleiri orkestrum.

Slick er ein bólkur, ið varð settur saman til stuttleika, nú All That Rain liggur í dvala eina tíð.

Men ikki kann sigast annað, enn at tað hevur verið boð eftir teimum, tí eir hava spælt rættiliga nógv og seinasta vikuskiftið vóru teir í íslandi, har teir vóru so væl fagnaðir, at íslendingar vilja hava teir aftur.

Tónleikurin, sum Slick spælir, er fyri tey, sum eru vaksin upp við rokktónleiki av ymsum slagi, tó mest fyri tey í yngru ættarliðunum, tí teir hava alt møguligt á skránni, heilt frá Rolling Stones til Pink, sum eru á 15 teimum bestu í løtuni.





# Hæddin ikki so høg sum Fríðrikskirkjan



*Marne Olsen arbeiðir beint undir skeltinum hjá Sosialinum í Saltangará*

**Marne Olsen í Rituvík røkkur næstan uppí takrennuna á bygninginum hjá arbeiðarafelagnum, Hæddini. Men tá ið hann fer at mála Fríðrikskirkjuna í summar, noyðist hann 28 metrar upp við penslinum. Hetta er ein himmalvíður munur á "hæddum", má sigast.**

LEYST OG FAST
*Vilmund Jacobsen*

Á blaðskrivstovuni hjá Sosialinum í Eysturoy detta fólk javnan inn á gólvið.

Summi koma í beinleiðis ørindum, og onnur steðga á at práta eina løtu, meðan bíðað verður eftir, at lánistovnur ella handil er opin. Uppaftur fleiri vitja inn á gólvið hjá Petur Olivar í Hoyvík ella Gimpa, sum hann verður róptur. Gimpi ger skeltir og annað beint við síðuna av skrivstovuni hjá Sosialinum, og bert ein hálvur metur er millum hurðarnar. Hvaðani kelinavnið Gimpi stavar, verður kanska ein søga eina aðru ferð.

Sosialurin leigar í góðum hølum hjá arbeiðarafelagnum, Hæddini, og felagið hevur sett at kalla øll húsini í stand.

Maðurin, sum hegnisliga hevur sett litir á nossligu hølini, er Marne Olsen í Rituvík, sum hevur fingist við at mála í mong ár. Alt er sera snøgt og væl úr hondum greitt.

Arbeiði, sum Marne hevur gjørt og framhaldandi skal gera fyri Hæddina, er umfatandi, men innandura er nú næstan bara skrivstovan hjá Hæddini eftir at mála.

Marne dettur inn á gólvið á Sosialinum av og á, og tað ger Gimpi eisini. Nú veðrið er gott, verður viðhvørt staðið í túninum og prátað.

Gimpi er sjálvstýrismaður, og Marne er sambandsmaður, og nú samráðingar eru um skipan av samgongu, fellir prátið ofta yvir í politikkin. Tá kann vera stuttligt at hoyra teir báðar, hvør í sínum lagi. Dettur Otto Frits Hansen, sum í mong ár var húsavørður í skúlunum í Runavíkar kommunu, so eisini inn á gólvið, er rættiliga stuttligt at líða á.

Otto er jú einki minni enn sonur tann tiltikna Hanusbónda í Nólsoy, og soleiðis er hann eisini mammubeiggi Ova Joensen, sum róði úr Nólsoy til Keypmannahavnar í 1986.

### Munur á hæddum

Marne er nú eisini farin í holt við bygningin hjá Hæddini uttan. Hann sparslar millum elementini, og møguliga skulu húsini eisini "tapetserast" uttan. Tað skulu vit ikki hanga okkum í á hesum sinni.

Bygningurin er rættiliga lágur á ovaru síðu, og Marne røkkur næstan uppí takrennuna, tá ið hann rættir seg upp. So, hetta er høgligt arbeiði, soleingi arbeitt verður omanfyri.

Meðan Marne snøggar um lága bygningin hjá Hæddini, hugsar hann um aðrar hæddir, og tær eru ikki smávegis.

Hann hevur nevniliga fingið til uppgávu at mála Fríðrikskirkjuna uttan í summar, og her noyðist hann heilar 28 metrar upp, tí so høgur er hesin bygningur uppí ovasta enda.

Marne fær tó einar tveir mans at hjálpa sær við Fríðrikskirkjuni, og hann heldur, at hendan uppgávan man fara at vera yvirkomilig hóast ørandi hæddina. Hann ætlar at byrja niðast við og so mála uppeftir. Meginparturin av arbeiðinum má gerast úr krana, og til tjúgund og seinasta noyðist hann at leiga stóra kranan hjá maskinverkstaðnum, Mekanik, í Runavík. Hesin er stórur og dýrur, og tí er umráðandi at vita, hvussu langt upp slepst við smærri kranum, sum eru bíligari at leiga, áðrenn kranin hjá Mekanik kemur uppí leikin.

Í túninum hósdagin helt Marne Olsen skemtiliga fyri, at eingin eiður má fella har uppi í kirkjutoppinum, tí annars veit eingin, hvat spyrst burtur úr!

Sjálvur væntar hann, at teir fara at megna hesa uppgávu, hóast hæddin á Fríðrikskirkjuni á Toftum á ongan hátt kann samanberst við Hæddina her inni í Saltangará, sum Sosialurin húsast.

# Kolumbus og Nornagestur á Sandi við nógvum upsa

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Týsdagin landaðu Kolumbus og Nornagestur 270.000 pund á Sandi.

Magnus Jespersen, stjóri á Sandoy Seafood, sigur, at meginparturin av veiðini hjá trolarunum var upsi, og hetta var hamiliga góður upsi.

- Hetta var serliga fiskur til flakaskeringar og frystingar í Skopun, sigur stjórin.

Í vikuni hevur snelluskipið, Antares, eisini landað á Sandi. Teir høvdu stívliga 40.000 pund. Upsin hjá teimum var meira smáttfallandi.

Magnus Jespersen sigur, at Sandoy Seafood hevur havt nóg mikið av fiski inni til alla hesa vikuna.

Útróður er lítil og eingin.

### Vendi aftur

Nú verkfallið er av, er tað ein lætti hjá Sandoy Seafood, tí goymslurnar vóru við at fyllast.

Undir verkfallinum bar Sosialurin tey tíðindi, at eitt av skipunum hjá Skipafelag Føroya hevði verið á Sandi eftir fiskavørum, og at skipið skuldi koma aftur á Sand hendan dagin, vit tosaðu við virkið í Skopun.

Portalurin hjá Føroya Tele, sum Sosialurin umsitur, bar hesi tíðindi beinanvegin, og

her hendi tað keðiliga, at Føroya Skipara-og Navigatørfelag setti seg í samband við skipið, sum vendi aftur í havnini á Sandi.

Men nú verkfallið er av, eru hesir trupulleikar loystir.

Frá Hotel Norð

Stórt kalt borð fríggjakvøldið aðrenn Norðoyastevnu

Høvi er at velja ímillum 30 ymiskar rættir.
Undir borðhaldinum er felagssangur við

Hans Hjalta Skaale
og øðrum

Bussur fer úr Klaksvík
kl. 17.45 og av Viðareiði á miðnátt

Kostnaður krónur 250,- við kaffi og te

Tilmelding innan hósdagin kl. 12.00

Kalt borð og gisting
í eina nátt

kr. 500,-

Hotel Norð



Tel 451244 Fax 451245 FO 750 Viðareiði